# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Karin Norðberg 80 ár

Ein heilsan til ommu mína á 80 ára degnum

Leygardagin 17. november vóru tað liðin 80 ár síðan omma mín Karin Norðberg varð borin í heim.

Karin Norðberg er gift við Jacob Norðberg úr Hvalba, og eiga tey tvær døtur Anna-Britt og Maiken. Fýra ommubørn og fimm langommubørn hava tey.

Omman er dóttur Onnu og Hjalmar Holm á Bakkanum í Hvalba. Hon er næstyngst av átta systkjum.

Tey búsettust í barndómsheiminum hjá Hjalmari, har omman og abbin hjá ommuni eisini búðu.

Ikki búðu tey leingi øll saman, lagnan vildi tað øðrvísi. Innan fyri eitt ár misti omman ommu sína og mammu sína, ið doyði av nátasjúkuni bert 34 ár. Tá var bróðir tín, Palleba sáli, sum tann elsti 14 ár.

Omman, tú vart sjálv fýra ár og systir tín Anna hálvt hálvt ára gomul.

Tá í tíðini var so at siga eingin hjálp at fáa. Pápi tín og abbin sóu seg ikki førar fyri at hava børnini heima.

Omman, tú vart her í Suðuroynni hjá familju. Tú misti pápa tín, tá ið tú vart 10 ár.

Omman fór sum 12 ára gomul til Havnar til systkinabarnið Niels Restorff og konuna Lilly.

Ommuni dámdi væl í Havn. Tú vart við í Havnar sangfelag, og væl dámdi tær, og systkinabarninum Hildu,



*Karin og Jacob Norðberg*

at koma inn á Kondittaríið og í Sjónleikarhúsið. Men altíð longdist tær aftur til Hvalbiar.

Tú komst oftani suður um fjørðin við gamla Smyrli, hóast tað kundi taka upp til 6 tímar at sigla.

Omman flutti til Danmarkar sum 19 ára gomul. Í Danmark arbeiddi tú á »De gamles by«. Tú royndi teg á einum barnagarði, har tú byrjaði at læra til barnapleygirsku, men tú gavst, tí tær longdist so illa heim.

Tú flutti til Havnar, har tú vart nøkur ár. Síðani flutti tú suður til aftur Hvalbiar.

Palleba bróðir, sáli, hevði brúk fyri húshjálp. Tú vart skjót suður, tí, sum tú so oftani hevur sagt, var Palleba sum ein pápi fyri teg. Komin suður hitti tú abban. Tit giftust inn á Skálabakka, har tit búðu, áðrenn tit fóru vestur undir Skallan at búgva, meðan húsini vóru í gerð.

Sum tað elsta av ommubørnunum havi eg altíð verið nógv hjá tykkum. Tú passaði meg, tá eg var lítil, tí mamma var í Danmark. At koma inn til tykkum følist altíð heitt og fjálgt. Mær hevur altíð dámt at koma og sova hjá tykkum, og tá skuldi abbin eisini í eitt annað kamar at sova.

Tú fýrdi upp við koli, so køkurin var heitur at koma upp til. Tað er serliga deiligt at koma inn í køkin ein kaldan vetrardag. Sum barn setti eg meg altíð við kolkomfýrin. Tú tók parhosurnar og hitaði tær við ovnin. Tú bað meg altíð leggja hendurnar undir armholurnar hjá tær at fløva, meðan eg bíðaði eftir fransbreyði við osti og kakao og fløða. Kolkomfýrin brúkar tú enn, og hugnaligt er at koma inn, tá ið tú stendur og vendir drýli á ringunum ella hevur eitt foys í ovninum.

Havi altíð vilja búð hjá tykkum á Heyggi, men so bleiv ikki. Eg var tann fyrsta, ið gav tær trý langommubørn, og serliga glað bleivst tú, tá ið eg kallaði tveir beiggjar hjá tær upp.

Góða omma, altíð hevur tú verið við mína lið, ongantíð sigur tú nei til at veita eina hjálpandi hond. Tú komst líka niður til Viborg at verða barnagenta, meðan eg lærdi. Um heystið ert tú altíð klár at hjálpa við at seyma rullupylsur og at gera blóðmør.

Omman! Líkamikið nær og hvar eg havi verið stødd, hevur tú altíð lagt oyra og hjarta til. Omman! Sigast má, at tú hevur lært av lívinum, tú er fyrimyndarlig, lítillátin og takksom.

Eg vil hervið ynskja tær hjartaliga tillukku við 80 ára degnum og alt tað besta í framtíðini.

**Bestu heilsanir**
**ommudóttir tín**
**Karin v/ familju**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði maður mín, pápi, abbi, langabbi og verfaðir okkara

**Jógvan Sofus Ferjá**
Gjógv

andaðist á Landssjúkrahúsinum hóskvøldið 15. november, 94 ára gamal.
Bønarhald verður í kapellium á Landssjúkrahúsinum mánakvøldið 19. november kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju týsdagin kl. 13.00.

***Jarnbrúðleypið 3. desember verður tí av ongum.***

*Familjunnar vegna*
**Dinnafía,**
**Gerda, Sjúrður, Katrin, Jónhild og Kristina**

Tey, ið vilja minnast Jógvan Sofus við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Gjáar kirkju.
Konta í peningastovnunum

---

†

Kunngjørt verður fyri vinum og kenningum, at

**Lone Barkholt Nielsen**

andaðist í heiminum í Gyllinge fríggjadagin 16. november, eftir stutta sjúkralegu.

*Tey avvarðandi*
**Luc, Lív og Emil**

---

**Dagurin**
**20. november. Volkmarus.** Einki halgimenni ber hetta navnið, men navnið er komið í álmanakkarnar í 1730.

---

# Símuni Einarsson til minnis



Tá ið eg henda dagin sat í Glyvra kirkju, sum ikki uttan grund var stappað við fólki, og eyguni festu seg við føðingardagin, sum stóð á blaðnum, ið eg hevði í hondini, fóru sum vera man nógvar hugsanir framvið.

6. apríl 1955. – Tað hevur ongantíð verið mín sterka síða at minst føðingardagar, men hesin, 6/4-55, hevði brent seg í sinnið. Hetta er ein av teimum føðingardøgunum, sum eg oftast havi skrivað í mynstringarbókina: Símun Einarsson, Lamba, stýrimaður, 6/4-55. – Okkara samstarv byrjaði í 1987, hann sum stýrimaður við Ametyst, og eg skipari á Jaspis.

Tað var ógvuliga skjótt, at eg sá, at hesin maður var ikki hvør sum helst. Álitandi og samvitskufullur sum nakar! Hansara heilt framúr góðu kropsligu evnir, sum eg mangan misunti honum, og ikki minst hansara lætta skemtingarsama lyndi, sum fekk tær myrku løturnar at kennast lættar, sermerktu hann.

Her samstarvaðu vit fram til 1993 – tey seinnu árini var Símun skipari á Ametyst. Her sótu vit tey árini á brúnni og samskiftu yvir telefonina – VHF – sum er neyðugt, tá ið samtrolað verður. Eg hugsi ikki, at tað nakrantíð fall eitt øvugt orð okkara millum – ið hvussu so er ikki frá Símuni.

Umframt at tosa um tað, sum hoyrir tí dagligu arbeiðsgongdini til, fisk, trol og veður og vind, so varð sum vera man tosað um mangt og hvat. Tað kundi vera alt frá politikki til fótbólt. Og tá ið vaktin var av, høvdu vit báðir, Símun, viðgjørt heimsstøðuna og annars alt, sum gekk fyri seg uppi á landi – og fingið alt upp á pláss.

Símun visti altíð onkra skemtingarsama søgu, og spiloppmakari var hann. Dámdi væl at spæla onkrum eitt puss – serliga teimum ungu, men á ein slíkan hátt, at teir blivu góðir við hann og flokkaðust um hann. Jú, Símun dugdi væl at fara við fólki og fekk sær ongar óvinir.

Í 1995 komu vit saman aftur og vóru saman til 2001. Símun bleiv stýrimaður og loysti av sum skipari við Boðasteini. At liggja einsamallur mitt ímillum kontinentini, einar 2-300 sjómíl norðan fyri Azorurnar, har sum havhesturin var líka sjáldsamur sum skjaldbøkan – tað var øðrvísi enn tað, vit vóru vanir við, og kravdi sín mann. Stundum í ódnarveðri, men ofta í stilli og bakandi sól.

Skjótt sást, at Símuni dámdi hetta heilt serliga fiskaríið eftir búrfiski – honum dámdi avbjóðingar, og hann var mær ein hollur stuðul sum stýrimaður og avloysaraskipari. Her komu hansara góðu eginleikar og hansara positiva lyndi av sonnum til sín rætt.

At fáa boðini um, at Símun Einarsson var farin, kom mær ógvuliga dátt við. Tað hevur verið mær ein sterk áminning um, at tað ikki er sjálvsagt, at vit eiga dagin í dag og tíansheldur í morgin.

Góða Sonja. Annebeth og eg hugsa um teg og tíni – og Símun, eg minnist teg við stórari virðing!

**Harry á Lakjuni**